

*Vágbingar vilja ikki góðtaka treytirnar frá Tvøroyrar Býráð og tí dettur samstarvið um sosialu deild niðurfyri, áðrenn tað nakrantíð byrjað*

– Vit koma at lata alt ov nógv frá okkum og tað kunnu vit ikki.

Og enn verri var tað, at ætlanin er at tann felags sosiala deildin skuldi vera ein stovnur beinleiðis undir umsitingini hjá Tvøroyrar býráð.

Hvørja ferð fólk skuldi setast í starv ella loysast úr starvi, skuldi tað sostatt vera eftir tilmæli frá umsitingini hjá Tvøroyrar býráð.

Sølvi Andreasen sigur, at Vágs Býráð er samt um, at tað ber ikki til at flyta so stóran part av myndugleikanum hjá Vágs Kommunu, norður til umsitingina hjá Tvøroyrar býráð at umsita.

Hann sigur eisini, at Vágs Býráð hevur roynt at taka hesi viðurskiftini til viðgerðar, men tað hevur ikki verið vilji til at gera tær neyðugu broytingarnar, so at Vágs Býráð kann taka undir við ætlanini.

Eitt, sum Vágs Býráð hevur roynt, er at fáa sosialu deild í ein stovn fyri seg, uttanfyri umsitingini hjá Tvøroyrar Býráð, men heldur ikki tað hevur borið til.

Sostatt slitnar hetta samstarvið og tað er hann ómetaliga harmur um, men hann heldur, at í hesum førum hevði ójavnin ímillum Vág og Tvøroyri verið so stórur, at tað bar ikki til.

Hann leggur kortini afturat, at avtalan um sjálva barnaverndina verður ikki ávirkað av hesum og heldur sostatt fram, sum ætlað. Men so verður spurningurin tikin upp í sambandi við næsta kommunuval seinast í 2008.

Í blaðnum í morgin hava vit blaðnum viðmerking frá Jens Johannesen, formanni í sosialu nevnd í Tvøroyrar kommunu.

## Skuldi mana gamla mýtu í jørðina

Tað var á hátíðarligum á fundi umborð á nýggja Smyrli mánadagin 31. oktober í fjør, at allir borgarstjórarnir í Suðuroy skrivaðu undir eina semju um at stovna eina felags barnavernd fyri alla Suðuroy.

Tað, sum gjørdi hetta til eina stórhending í Suðuroy, er, at so vítt nakar visti um, er hetta fyrstu ferð, at allar kommunurnar í Suðuroy semjast um eitt samstarv, sum fevnir um alla oynna.

Tað var eisini ein partur av hesi avtaluni, at tað skuldi eisini arbeiðast fram ímóti at stovna eina felags sosiala deild fyri alla Suðuroy.

Tá hildu borgarstjórarn, at manaði allar mýtur í jørðina um, at suðuroyingar kundu ikki samstarva.

Men , sum tað sæst, bar ikki til at føra semjuna á mál og sostatt vera nú tvær sosialar deildir í Suðuroy.




# SPEKT søkir KT ráðgeva

SPEKT veitir ráðgeving og grannskoðan til allar greinar innan handil, ídnað, fígging og almenna fyrisiting. Ein av stóru avbjóðingunum hjá kundum okkara er:

*Hvussu kann nýtslan av KT skipast best møguligt fyri at náa settu handilsligu málini, samstundis sum tryggjað verður móti teimum vansum, sum eru knýttir at nýtsluni av KT*

SPEKT søkir tí eftir einum KT ráðgeva, sum skal veita ráðgeving og grannskoðan innan KT økið og harvið hjálpa kundunum við at betra virkismannagongdirnar uttan at tað gongur út yvir trygdina.

**Arbeiðið**
Arbeiðið fevnir fyrst og fremst um at:

- Ráðgeva í sambandi við skipan av KT økinum
- Veita ráðgeving um stýring av vansum, sum eru knýttir at KT nýtsluni
- Greina og eyðmerkja veikleikar í KT trygdini
- Meta um og eftirkanna verandi eftirlitsskipanir
- Ráðgeva í sambandi við skipan og verkseting av nøktandi eftirliti

Arbeiðið verður framt í tøttum samstarvi við kundan. Vit hava eina samstarvsavtalu við KPMG í Danmark, sum ger tað møguligt at fáa ráðgeving frá IT Risk Management deildini hjá teimum, um tørvur er á tí.

**Umsøkjarin**
Vit ímynda okkum, at tann, ið søkir starvið:

- hevur royndir og/ella ástøðiliga útbúgving innan KT-økið
- er fryntligur og fyrikomandi
- er til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð
- er áhugaður í at halda áfram við at menna seg innan KT-økið við at luttaka á viðkomandi skeiðum hjá millum annað KPMG

Lønin verður ásett eftir útbúgving og royndum.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda okkum í seinasta lagi 30. september 2006.

Meira fæst at vita við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 34 ella 22 28 52.

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17 · Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15 · Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefax 474 475

SPEKT statsaut. revisorar